## Grønland skal vera burðardygt

Grønlendski landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at í framtíðini skulu teir grønlendsku politikararnir hava burðardygdina í huga, hvørja ferð teir taka eina avgerð. Í síðstu viku var Palle Christiansen (myndin) á einari ráðstevnu um burðardygd. Har lærdi hann millum annað, at í Finnlandi hevur burðardygd verið ein fastur partur av øllum politiskum avgerðum í 30 ár, og nú vil landsstýrismaðurin hava somu hugsan til Grønlands. Palle Christiansen sigur við KNR, at allar avgerðir skulu byggja á aðalhugsjónina, at vit skulu lata okkara eftirkomarum samfelagið í líka góðum standi ella betri enn nú.



## Framvegis reytt í Danmark

Hevði fólkatingsval verið í dag, hevði stjórnin hjá Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra tapt. Sambært einari nýggjari meiningakanning hevði andstøðan fingið 91 umboð í Fólkatingið og sostatt meiriluta til at skipa satjórn. Kanningin gevur Sosialdemokratunum 47 tinglimir ella tveir fleiri, enn flokkurin hevur nú. Samstundis fær Sosialistiski Fólkaflokkurin níggju tingmenn afturat teimum 23, sum flokkurin hevur. At enda fær Tey Radikalu átta og Eindarlistin fýra tinglimir. Bláu megin miðjuna fáa Vinstri 43 tinglimir, Tey Konservativu 18 og Danski Fólkaflokkurin 23 ella tilsamans 84.

# Koma ikki við nøkrum endaligum



*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, roknar ikki við, at nakrar veruligar semjur koma í morgin. Hinvegin roknar hann við, at tað verður greiðari, hvat landsstýrisfólkini ætla sær*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

**Hóast alt landsstýrið er samlað við Gjógv í dag og í morgin, so verður fíggjarlógin fyri 2011 ikki nógv nærri í morgin enn hon er í dag. Hinvegin verður helst greiðari, hvørji stig ymisku landsstýrisfólkini vilja taka**

FÍGGJARLÓG
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

**Gjógv:** Í dag og í morgin eru øll landsstýrisfólkini saman við nøkrum embætisfólkum við Gjógv, har fíggjarlógin fyri 2011 verður umrødd, umframt at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum skal greiða landsstýrinum frá, hvussu ein fiskivinnureformur kann gerast.

### Onki konkret

Hóast landsstýrið hevur kallað inn til tíðindafund í morgin, so merkir tað á ongan hátt, at fíggjarlógin verður nakað serliga nógv nærri í morgin, enn hon var í gjár.

Á skránni hjá landsstýrisfólkunum til fundirnar í dag er nevniliga ætlanin, at tey koma við sínum íkasti, til hvat kann gerast við fíggjarlógini fyri 2011 í fyrsta lagi, umframt, hvat kann gerast til komandi fíggjarlógin.

– Hetta er ein longri landsstýrisfundur, har vit millum annað koma við einum avrikslista, sum vísir, hvat er komið burturúr.

– Vit skulu hava eitt forstáilsi fyri, hvussu fíggjarlógararbeiði skal vera. Tað er jú fyrsta árið við nýggju játtanarskipanini, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Hann leggur dent á, at tað ikki verður í dag ella í morgin, at fíggjarlógararbeiðið verður liðugt.

– Vit skulu hava nakrar karmar, hvussu vit koma burturúr tí halli, sum vit hava havt. Og vit arbeiða fram ímóti at fáa hallið burtur innan 3-5 ár. Tað er nakað, vit fara at tosa um, sigur løgmaður somuleiðis.

### Fleiri vinklar

Somuleiðis sigur Kaj Leo Johannesen løgmaður, at meiningin við hesum langa landsstýrisfundinum við Gjógv, er at fáa ymiskar vinklar og íkast hjá landsstýrisfólkunum á borðið.

– Landsstýrið skal koma við nøkrum vinklum til okkara samgongufelagar í løgtinginum, sigur Kaj Leo Johannesen, sum á sama hátt, sum øll hini landsstýrisfólkini, ikki vil koma nærri inná, júst hvat skal gerast.

### Minka útreiðslur og vaksa inntøkur

Hinvegin eru landsstýrisfólkini rættiliga samd um, at ymisk tiltøk mugu setast í verk, fyri at minka um munin millum útreiðslur og inntøkur.

– Tað eru tveir møguleikar at gera tað uppá, segði ein populerur persónur langt síðan, og tað verður ein kombinatión av at minka útreiðslurnar og vaksa inntøkurnar.

Serliga Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin eru ikki á einum máli um, hvussu inntøkurnar og útreiðslurnar kunn samsvara betur enn tær hava, og hetta respekterar løgmaður.

– Tað eru ymiskir flokkar og einstaklingar. Tað skal mann duga at respektera.

– Kunsturin í politikki er at samansjóða sjónarmiðini, og so finna semjur burturúr. Tað er tað, sum politikkur snýr seg um. Tað er bara at finna semjur, sum kunnu vísa okkum framá, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Sosialisera

Hann vísir eisini á, at tað, at landsstýrið er farið út á bygd, merkir at tey hava betur møguleika at tosa saman um tingini, men hann heldur ikki, at samstarvið hevur haltað higartil.

– Vit hava havt eitt gott samstarv, hóast tað onkuntíð er komið eitt sindur kantut í fjølmiðlunum. Men tað skal tað kanska eisini onkuntíð, sigur løgmaður, men staðfestir enn einaferð, at meiningin ikki er at koma við nøkrum endaligum í morgin, tá tíðindafundur verður við Gjógv.

Men hóast onki konkret kemur á borðið í morgin, so verður kravt av landsstýrinum í landsins játtanarskipan, at fíggjarmálaráðharrin áðrenn 1. apríl kemur við einum uppskoti um karmar, sum er býtt út á ymisku greinirnar.